


## Skaða av eldi og royki

Leygarmorgunin varð boðað frá eldi í einum húsum á velbastaðvegnum.

Fráboðanin komn klokkan 9.43 í leygarmorgunin, men longu 20 minuttir seinni, klokkan 10.04, varð boðað frá, at eldurin varð sløktur.

Løgreglan veit ikki, hví eldur kom í, men hann kyknaði í einum rúmi í kjallaranum, beint við eina teldu.

Rúmið, har eldurin kyknaði, hevur fingið skaða av eldinum, men annars hava húsini fingið roykskaða.

## Tríggir mans tiknir

Sunnudagin handtók løgreglan tríggjar mans eftir eitt ferðsluóhapp í Leynum.

Ein bilur rendi á ein garð, men teir, sum vóru í bilinum rýmdu av staðnum. Teir komu kortini ikki so langt, tí teir vórðu allir tríggir tiknir nakað seinni. Blóðroynd er tikin av av øllum trimum og so mugu víðari kanningar vísa, hvør av teimum koyrdi.

# Væleydnað konsert við Høgna Lisberg

**Konsertin hjá Høgna Lisberg á Iceland Airwaves í Tjóðarleikhúskjallaranum í Reykjavík var væleydnað og væl vitja av fjølmiðlum bæði íslendskum og útlendskum.**

KONSERT
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Høgni Lisberg var eitt av nøvnunum á singer/songwriter pallinum í Tjóðleikhúskjallaranum, og sambært heimildarmanni okkara í Reykjavík Jens Guð, so gekk konsertin væl.

– Fólk vóru væl nøgd við konsertina og Serliga tey bæði løgini Learn To Ride On Waves og Morning Dew kendu fólk aftur, tí tey eru spæld rættiliga fitt í íslenskum útvarpi, sigur Jens Guð

– Eg sá fleiri Høgna fjepparar millum áskoðararnar, m.a. ein flokk av fólki sum starvast á almennu útvarpsstøðini Radio 2, eitt nú Ásgeir Eythórsson, ið samskipaði AME Reykjavík í vár og Freyr Eyjólfsson, ið var dómari í Prix Føroyum og GBOB, men eisini fleiri onnur. Eisini vóru nøkur blaðfólk, eitt nú Arnar Eggert Thorodssen av Morgunblaðnum, ið eisini hevur dømt Prix Føroyar og GBOB. Eg sá eisini fleiri útlendskar myndamenn, ið starvast fyri útlendsk tónleikabløð og teir tóku nógvar myndir, greiðir Jens Guð frá.

Eftir konsertina seldi Jens Guð fleiri Høgna Lisberg fløgur, flestu av hesum vóru til útlendingar.

– Eg skilti á lagnum, at fleiri fólk bóðu Høgna um visitkort, sigur Jens Guð og veit eisini at siga, at Høgni gjørdi eina langa samrøðu við eitt kanadiskt sjónvarpslið.

Íslendsku miðlarnir nevndu konsertina hjá Høgna í gjár. Eitt nú var hon tikin fram sum ein av bestu konsertunum fríggjakvøldið í sending á Rás 2, og í Reykjavík Grapevine skrivar ummælarin heilt stutt um fríggjakvøldið í Tjóðleikhúskjallaranum: ” Høgni was a bit more like an earnest James Blunt with less of the cunt.”



## Teitur á týskari savnsfløgu

Teitur Lassen nærum svimur í jaligum ummælum. Ummælarar kring allan heim hava staði í røð fyri at geva „Stay Under The Stars“ góð ummæli, og fyrsta stakfløgan, “Louis Louis“, verður dúgliga spæld víða um. Nú hava týskarar tikið lagið til sín, og tónleikablaðið „Musikexpress“ hevur lagt lagið við á nýggju “samplefløguna“ sum fylgir við November blaðnum.

Blaðið Musikexpress hevur verið til síðan 1969, og hevur uml. 300.000 lesarar uppá eitt upplag á 60.000. Blaðið viðger rokk, popp og indipendant tónleik. Musikexpress verður útgivið einaferð um mánaðin, og fylgir ein “sample-fløga” við hvørjum blað. Ein “samplefløga” er ein fløga, sum inniheldur tónleik hjá fleiri ymiskum, aktuellum tónleikarum.

Í fløguni er eitt lítið ummæli av lagnum “Louis Louis”. Har verður millum annað tikið soleiðis til:”Ballada av kongaligum vakurleika”. Í ummælinum verður eisini skrivað, at tónleikurin hjá Teiti, er sprotin úr einsemi og isolatión. Hesar kenslur hevur Teitur helst lært at kenna í Føroyum, veit Musikexpress at siga.

Samanumtikið má sigast, at hetta er eitt stórt stig fyri ambitiøsa Teit Lassen.

# Væleydnaður 25 ára føðingardagur

**Pensjónistafelagið í Suðuroyar Norðaru helvt hevði rimmar veitslu í gjárkvøldið**

Pensjónistafelagið HØFT í Norðaru helvt í Suðuroy er eitt tað virknasta í landinum. Óg nú felagið hevur rundað tey 25, varð tað hátíðarhildið við rimmar veitslu í Skúlanum í Trongisvági.

Har hittust eini 140 fólk úr øllum landinum, tí umframt pensjónistar í felagnum, hvødu tey eisini bjóðað umboðum úr hinum pensjónistafeløgunum í landinum, við.



*Hóast ringt í sjónum, vóru fólk komin úr øllum landinum at hátíðarhalda dagin saman við suðuroyingum. Her er tað eitt umboð fyri Sunda Pensjónistafelag, sum takkar fyri innbjóðingina og handar teimum eina gávu*

Boðrreitt var við heitum mati, góðum røðum og lívligum sangi og aftana var dansur.

HØFT stendur fyri Hvalba, Øravík, Fámjin og Tvøroyri og tað eru fólk úr hesum býum og bygdum, sum eru limir í felagnum.

Men bý- og bygdaráðini í limakommunum vóru eisini við og tey høvdu hvør sín kekk við til felagið.

Eitt, sum eyðkennir HØFT eru tær mongu uttanlandsferðirnar, sum felagið ger. Tey hava ferðast víða um norðurlond, í týsklandi og aðrastaðni við og næsta ár skilja vit, at leiðin gongur til Póllands.



## Til Íslands

Fríggjadagin fer Betesdakórið í Klaksvík til Íslands at vitja samkomuna Akurinn í Kópavogi. Leygarkvøldið kl. 20 syngur kórið í Breiðholtskirkju, og har fer Eyðun Eltør at tala. Sunnudagin kl. 17 hevur kórið føroyskt møti í Sjómansheiminum Ørkini í Reykjavík, og kl. 20 um kvøldið syngur kórið aftur í Breiðholtskirkju, tá Tummasarmessa verður hildin í kirkjuni. 45 sangarar eru í Betesdakórinum á Íslandsferðini.

# Løgreglan havt fullar hendur

**Løgreglan hevði úr at gera leygarnáttina. Nógv tað mesta hevur verið at skilt bardagakroppar sundur**

Løgreglan hevði eina strævna nátt leygarnáttina

Ikki tí, at trupulleikarnir vóru so stórir, men teir vóru nógvir í tali.

Og felagsnevnarin er, at talan var um fólk, sum eru komin til ilnar og í flestu førum var rúsdrekka uppi í.

Nú er koyrandi úr stórum parti av landinum til Havnar og tað merkir eisini náttarlívið við tað, at mangan savnast nógv fólk í miðbýnum í Havn.

Leygarnáttina var Løgreglan heilt nógvar ferðir verið í býnum har tey ymsu dansistøðini og náttklubbarnir eru, tí fólk vóru komin til ilnar.

Sum heild gevast tey, tá ið løgreglan vísir seg, men í einstøkum førum má leggjast upp í at fáa partarnar sundur.

Og tveir mans vórðu tiknir á støðuna, tí teir vóru so ólátaðir, at løgreglan helt ikki, at tað var ráðiligt, at teir vóru ímillum fólk.

Teir vóru í einum dansistaði. Tá ið stongt varð, vildu teir ikki fara, men bjóðaðu av at brejast og so varð løgreglan boðsend og hon tók teir við á støðina, har teir gistu um náttina.